# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Teir løgdu merkis til Rógva

**Fleiri útlendsk feløg sýna nú áhuga í Rógva Jacobsen. Millum hesi er eisini okkurt, sum spælir í italsku seriu B**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Við tveimum málum móti italsku heimsmeistarunum setti Rógvi Jacobsen seg sjálvan í fokus. Og tað er ikki frítt, at útlendsk feløg hava givið hesum ans*

Við fýra landsliðsmálum í ár var Rógvi Jacobsen uttan iva tann føroyski landsliðsspælarin, sum í størstan mun gjørdi vart við seg sjálvan mótvegis útlandinum. Og hetta er eisini nakað, sum fleiri útlendsk feløg hava lagt til merkis.

Sjálvur váttar Rógvi Jacobsen eisini, at fleiri útlendsk feløg hava spurt seg fyri, men enn er so einki ítøkiligt komið burtur úr hesum.

- Har hava verið fleiri fyrispurningar úr fleiri ymiskum londum. Enn er so einki ítøkiligt tilboð komið burtur úr hesum. Einki annað enn okkurt tilboð um royndarvenjing, men tað havi eg gjørt upp við meg sjálvan, at eg ikki tími. Tað skuldi ikki verið neyðugt at royndarvant, tá tú hevur skorað tvær ferðir móti Italia, leggur hann flennandi afturat.

Sjálvur vil Rógvi einki siga um, hvørji feløgini eru, sum hava sýnt áhuga. Sosialurin hevur tó skilt, at mest ítøkiliga tilboðið í løtuni er úr Noreg, men at eisini okkurt íslendskt felag og okkurt úr italsku Seriu B hevur sýnt stóran áhuga fyri høvuðssterka spælaranum.

Við sínum 28 árum er Rógvi tó ikki nakar unglingi longur, og hann sigur eisini, at talan skal vera um gott tilboð, um hann skal taka av.

- Tað sigur seg sjálvt, at eg ikki uttan víðari leypi avstað. Men hinvegin er tað sjálvandi spennandi at frætta, at møguleikin nú aftur er til staðar. Og kemur rætta tilboðið, so fari eg sjávlandi avstað, sigur Rógvi.

Rógvi Jacobsen hevur áður royndt seg uttanlands. Bæði í Íslandi, har hann spældi við KR, og í Danmark, har hann eitt skifti var leigaður til SønderjyskE.

# Mikkjal til EB/Streym

**Einki er váttað, men alt bendir á, at Mikkjal Thomassen spælir á miðvøllinum hjá EB/Streymi komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Líka síðani kappingarlok hevur ljóðað, at eitt tað ovasta navnið á ynskislisstanum hjá EB/Streymi var Mikkjal Thomassen, sum annars hevur spælt í B36 síðani 1998.

Og nú skuldi tað verið heilt víst. Sjálvur sigur Mikkjal seg ikki hava nakra viðmerking um, hvar hann spælir fótbólt komandi kappingarár, men sum skilst, so er tað nú bert undirskriftin, sum restar í, áðrenn hann formliga verður EB/Streyma spælari.

Og tað er einki at ivast í, at hetta er sannur fongur fyri EB/Streym. Í mun til árið í fjør, so hevur liðið mist Símun Eliasen á sentrala miðvøllinum, og tað holið er mest sum upplagt hjá Mikkjali at fylla. Til sentralu plássini hevur EB/Streymur eisini Ronnie Samuelsen, Bárð Olsen og Høgna Zachariassen, men bæði Bárður og Høgni kunnu eisini spæla sum bakkar, so hetta verður í ringasta føri ein positivur trupulleiki hjá venjaranum.



*Tað skuldi nú verið púrasta vist, at Mikkjal Thomassen komandi ár spælir við EB/Streymi*

## Jón Rói og Súni í Parkini

**Báðir føroysku spælararnir vórðu á vøllinum í 2. hálvleiki, tá ið AaB í gjár vann venjingardyst í Parkini ímóti FCK**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fótbóltslagið í Aalborg hevur leingi verið gott, og hóast SAS ligan er farin í vetrarfrí fram til 16. mars, so var tað seinnapartin mikudagin aftur orsøk at fegnast í AaB. Felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen var í Parkini í Keypmannahavn og spældi venjingardyst ímóti FCK, og AaB vann 1-0. Meðan SAS ligan er í vetrarfrí, er AaB oddalið við 36 stigum, og FCK er á øðrum plássi við 34 stigum fyri átjan dystir.

Í heyst hevur leiklutурin hjá Jón Róa Jacobsen og serliga Súna Olsen verið ógvuliga lítil á besta AaB liðnum. Í dag vóru teir báðir í Keypmannahavn við besta liðnum, og í 2. hálvleiki vóru teir báðir á ikki serliga góða grasinum í Parkini.

Jón Rói Jacobsen varð beinanvegin eftir steðgin settur á vøllin fyri Allan Olesen, sum í 1. hálvleiki hevði verið vongverji í høgru, og í 54. minutti kom Súni Olsen á vøllin fyri vinstra vongverjan, Michael Jakobsen. Minuttin eftir at Súni var komin á vøllin, skoraði svenski miðvallarin Mattias Lindström sigursmálið fyri AaB.

Felags fyri bæði AaB og FCK er, at feløgini framvegis eru partur av bólkaspælinum í UEFA Cup kappingini. Síðsta umfarið í tí kappingini verður í næstu viku. Mikudagin 19. desember skal AaB spæla í Tel Aviv ímóti Hapoel, og hósdagin skal FCK spæla í Aberdeen. Tað var fyri at halda dystarvenjingina við líka, at tey bæði oddaliðini í superliguni í dag spældu vinardyst í Parkini.

Longu í morgun vandu føroysku fótbóltsútisetarnir og liðfelagar teirra í Aab aftur í Aalborg.